# Trøllvaksin barnagarður



*Tær smíða seymar í bjálkan*

**Leygardagin hátíðarhildu barnagarðurin og vøggustovan við Velbastaðvegin, at tey eru vorðin tilkomin. 30 ár eru liðin, síðan stovnarnir báðir vóru tiknir í nýtslu. Sama dag kundi eitt starvsfólk halda bæði runda dagin, 30 ára starvsdag og føðingardag**

FØÐINGARDAGS-BARNAGARÐUR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Nógv vatn er runnið í Sandá oman ígjøgnum Havnardal, síðan fyrsta barnið kom stetlandi inn í vøggustovuna við Velbastaðvegin fyri 30 árum síðan. Leygardagin hátíðarhildu barnagarðurin og vøggustovan dagin. Og tað varð gjørt við stíli.

Børn, sum ganga á stovnunum, systkin, foreldur, starvsfólk og vinir møttu í stórum tali, og skipað varð fyri undirhaldi, so børnini ráhugnaðu sær.

## Sangur og skemt

Stóra hittið millum tey smáu, Angela og Hannibal, fingu smílini og rópini fram hjá bæði børnum og vaksnum í allar fagrasta veðri. Einastu løtuna, nakrir dropar fullu, var tá Malan Thomsen, sum undirhelt saman við manninum Finni Hansen, sang um regnið. Annars varð skróvturt og sólin sá.

Seinni spældu fólk frá Grímu, Kristina Hansen og Jenny Petersen, barnasjónleik á høgum stigi upp í klatriborgini, og tað sást, at onki kann bergtaka børn meira enn livandi kongssynir, trøll og prinsessur.

Dagurin byrjaði klokkan tíggju. Gjøgnum dagin sluppu børnini at smíða, grilla og eta pylsur, dansa og syngja, so tey vóru mett av bæði upplivingum og mati, tá føðingardagurin var av um eitt-tíðina.

## Trífaldur dagur

Hjá einum manni var dagurin heilt serligur. Húsavørðurin Sune Hammer hevur arbeitt við Velbastaðvegin frá fyrsta degi. Umframt runda dagin hjá stovninum, varð eisini heiðrað, at hann hevur verið har í 30 ár. Bara Poulina, sum í dag avloysir, hevur eisini verið við frá fyrst degi.

Í hesum sambandi hevði Ingilín Berg gjørt eina dukku, sum líktist Suna meira enn Sune sjálvur, og tað flenti hann nógv eftir. Serliga tí hann ikki hevði funnið arbeiðsklæðini dagin áðrenn. Tað kom eisini fram, at Sune hevði føðingardag leygardagin, so tað fekk hann sjálvandi eitt trífalt hurra og blómur afturfyri.

Í dag ganga umleið 100 børn á barnagarðinum og vøggustovuni við Velbastaðvegin tilsamans. Frá komandi ári verður talan um ein og sama stovn, tá garðarnir verða lagdir saman.



*Angela fekk børnini at hoppa og dansa*



*Børnini grillaðu síni egnu breyð*





*Leiðarin á Barnagarðinum Mona Rasmussen Mohr*



*Sune Hammer, sum eisini hevði 30 ára starvsdag, varð ovfarin húsavarðadukkuni*